## Trúfastur luttakari



Hanna Petersen hevur verið á sangskeið mestsum hvørja ferð síðani tað byrjaði í 1978. Tað er kanska fýra ferðir at sangskeið hevur verið, har ið Hanna Petersen ikki var ímillum luttakararnar.

- Mær dámar sera væl at vera á sangskeið. Her er góður felagsskapur, og vit læra nýggjar sangir, sigur hon.

Hanna fegnast um, at nógv ung koma á sangskeið.

- Tað er deiligt at síggja nógv ung. Tað mangla kanska nøkur í mínum aldri, men tað er so nógv at fara til. Tann ungi føroyski kórleiðarin, Ásbjørn Berthelsen, klárar seg væl. Hann hevur dugað væl at valt góðar fjølbroyttar sangir. Summir eru lívligir, meðan aðrir eru róligir. Soleiðis raka vit allar aldursbólkar, sigur Hanna at enda.

**- heinik**

## - Gott upplivilsi



Andrias Magnussen av Toftum er á sangskeið fyri fyrstu ferð. Spurdur um, hví hann fer á sangskeið, svarar hann:

- Fyri tað fyrsta eri eg uppvaksin innan Heimamissiónina, og tí komi eg til nógv tiltøk hjá Heimamissiónini. Annars dámar mær væl at syngja, og hetta er eitt gott høvi at læra meira, nú vit syngja í eina heila viku.

Andrias hevur lært nógv hesa vikuna. Honum dámar eisini væl felagsskapin á sangskeiðnum.

- Vit hava tað gott saman her. Ásbjørn, kórleiðarin, hevur lært okkum nýggjar sangteknikkir. Hann leggur stóran dent á, hvussu vit standa, og at vit fara tíðliga í song. Hann sigur, at tað er rættiliga vanligt, at nógv missa røddina hósdagin ella friggjadagin, tí at tey gloyma at hvíla røddina, sigur Andrias.

Hann sigur, at tey eru spent til konsertina leygarkvøldið.

**- heinik**

# Góð smakkiroynd av sangleikinum FAME

**Klokkan 9 í morgun varð boðið til tíðindafund í hølunum hjá Tryggingarfelag Føroya, har ið sangleikurin FAME varð eksponeraður**

SANGLEIKUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Avtalan um stuðul frá Tryggingarfelag Føroya varð undirskrivað fyrst.

Jákup Weyhe greiddi frá brotum úr leikinum, og ímillum sungu næmingarnir nakrar sangir. Har vóru nakrar framúrskarandi soloframførslur frá ungu studentunum. Tað var av sonnum ein góð smakkiroynd, sum hevur einum hug at fara at hyggja at leikinum í fullari longd í Norðurlandahúsinum.

Sigrið Sivertsen hevur vant leikararnar í sangi. Hon er væl nøgd við úrslitið, og hon lovar, at tey vera enn betri til framførsluna.

- Tað hevur verið nógv arbeiði at venja sang við teimum. Men tey hava øll ment seg sera nógv. Tann eini, sum sang solo í dag, hevur ongantíð sungið fyrr, so tað er rættiliga flott, sigur Sigrið.



*Gunnar í Liða, forstjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar, stendur frammanfyri nakrar av leikarunum í FAME*
*Mynd: Heini S. Kristiansen*

# Bara sungið undir brúsuni

**Tíðindafundurin beyð millum annað uppá eina "solodebut" frá Terja Djurhuus. Øll vóru samd um, at tað ljóðaði sera væl hjá honum. - Eg havi einans sungið udnir brúsuni áðrenn, sigur hann**

SANGLEIKUR
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*Terji Djurhuus framførir fyri fyrstu ferð alment. Tað ljóðaði sera væl hjá honum. - Hetta kravdi, at eg breyt nøkur mørk, sigur hann*
*Mynd: Heini S. Kristiansen*

Ein av leikarunum í sangleikinum FAME er Terji Djurhus úr Kollafirði. Hann gongur í 3. Ð í Hoydølum. Hann sang solo á tíðindafundinum í morgun. Øll á staðnum vóru samd um, at tað ljóðaði sera væl hjá honum. Men Terji er ikki nakar royndur sangari.

- Hetta er fyrstu ferð at eg havi sungið alment. Annars havi eg altíð verið ein skápssyngjari. Eg havi sungið undir brúsuni, men hetta var eitt stórt stig fyri meg.

Terji mátti bróta nøkur mørk, tá ið hann trakaði fram í dag.

- Eg havi sera nógvar nervar. Eg hevði sum sagt ongantíð sungið alment fyrr. Eg havi lært nógv av undirvísingini hjá Sigrið, og vónandi fari at menna meg enn meira, sigur Terji.

- Hann útihýsir ikki, at hann fer at gera meira við sangin í framtíðini.

- Eg havi fingið betri sjálvsálit av hesum. Tað kann vera, at eg fari at gera meira við sang í framtíðini. Eg útihýsi tí ikki, sigur Terji at enda.

Kórleiðarin:

# Sangskeiðskórið klárt til eina rimmarkonsert

**Gott hundrað fólk eru í stóra kórinum á sangskeiðnum í ár. Afturat hesum eru umleið 30 børn í barnakórinum. Ásbjørn Berthelsen, kórleiðari, lova eina rimmar konsert leygarkvøldið**

SANGSKEIÐ
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*



*Sangskeiðskórið í fullari ferð við at venja. Kórleiðarin, Ásbjørn Bethelsen, stendur frammanfyri kórinum. Konsertin verður leygarkvøldið klokkan 19 í ítróttarhøllini á Eiði*

Aftur í ár er tað afturvendandi sangskeiðið hjá Heimamissiónini í Nesvík. Kórið hevur nú vant í eina knappa viku, og sangskeiðið endar við einari konsert í ítróttarhøllini á Eiði leygardagin klokkan 19.

Í ár er Ásbjørn Berthelsen kórleiðari hjá stóra kórinum. Ásbjørn er ættaður av Strondum. Hann hevur drúgvar royndir sum kórleiðari hóast ungur enn. Hann leiðir eisini kórið VOX. Tað eru mangar familjur, sum eru á sangskeið mestsum á hvørjum ári. Sosiali parturin liggur ikki eftir. Eitt barnakór er eisini, og tí liggur væl fyri hjá familjum at fara á sangskeið í barnavinarliga umhvørvinum í Nesvík.

- Tað hevur gingið sera væl hesa vikuna. Sangararnir læra skjótt og væl. Vit eru faktiskt longu klár til konsertina leygardagin, segði Ásbjørn, tá ið Sosialurin møtti upp til venjing í Nesvík í gjár.

- Vit skulu líka verða samanspæld við tónleikararnar. Kórið og tónleikararnir hava vant hvør sær, og í dag er fyrsti dagur, at vit hava vant saman. Annars fer restina av tíðini til at fínpussa, sigur Ásbjørn.

**Høgur miðalaldur**

Miðalaldurin í ár er lægri enn vanligt. Ásbjørn dugir ikki ordiliga at siga, hvør orsøkin er til tess.

- Tað eru sera nógv ung. Serliga eru tað nógv, sum akkurát hava aldur at vera við í stóra kórinum. Tað er óheppið, at tað ikki er eitt javnt býti millum aldursbólkarnar, sigur hann, men hann dugir ikki at siga, hví tey eldru halda seg aftur at koma.

Sangskeiðið er eitt stórt tiltak, og Ásbjørn er sera errin av at sleppa at vera kórleiðari.

- Eg havi altíð verið til sangskeið. Pápi mín sat í sangnevndini, sum skipar fyri sangskeiðnum. Í mínum hugaheimi hevur sangskeiðið altíð verið tað størsta tiltakið í landinum innan kór, og tí er tað eisini sera stórt, at eg nú sleppi at leiða kórið. Eg segði nei fyri trimum árum síðani, tá ið eg eisini varð spurdur, tí at tá kendi eg meg ikki kláran. Men eg havi ment meg nógv síðani tá, og hetta hevur verið eitt sera gott upplivilsi og læruríkt hígartil, sigur Ásbjørn.

Tað hevur gingið væl undir venjingunum, og Ásbjørn lovar eina rimmar konsert leygarkvøldið.